


# Oljufeløg styrkja KT-trygdina

**Jan Müller**

08.03.2014 - 19:41

Oljan.fo

KT-trygd hevur fingið eina støðugt fremri raðfesting í oljuídnaðinum tey seinastu árini, og sambært ráðgevingarfyritøkuni Steria fer tørvurin at standa við.

Ein kanning, sum kanningarstovnurin Rock II hevur gjørt fyri Steria, vísir, at 37 prosent av heimsins oljufeløgum hava brúkt meiri pengar til KT-trygd tað seinasta árið.

-Ídnaðarnjósning hevur altíð verið ein hóttan ímóti olju- og orkuvinnuni. Tá 80 prosent av feløgunum í vinnuni leggja størri dent á teirra KT-trygd, er tað eitt tekin um, at vandin er øktur, sigur David Cameron, stjóri skandinavisku olju- og orkudeildini hjá Steria.

Kanningin hjá Steria vísir, at uppaftur fleiri feløg fara at seta ferð á sínar KT-verkætlanir í ár. Felagið vísir samstundis á, at í fleiri fyritøkum koma KT-leiðararnir upp í ovastu

leiðsluna, og at hetta er eitt týðiligt tekin um, hvussu stórur dentur verður lagdur á KT-trygdina.